LANDSROYND
APRÍL 2012
Føroyskt, lesa og skilja

4. flokkur

# FØROYSKT

45 minuttir




| Navn: | Flokkur: |
| --- | --- |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Tú kanst skriva við blýanti.

**Set X við røttu myndina**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| víndrúvur |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| súkkla |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| breyð |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| sjónvarp |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| kavamaður |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| traktorur |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| kráka |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| jólatræ |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| hundur |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| blýantur |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

**Les setningarnar á síðuni og skriva rætt tal við myndirnar á síðu 5!**

1. Appelsin er ein frukt
2. Bøndur koyra ofta traktor
3. Tá ið beiggi fylti, fingu vit lagkøku
4. Vit brúka blýant í skúlanum
5. Krokodillan bítur sera fast
6. Nógvir fuglar koma til Føroya um várið
7. Abbi dugir væl at baka breyð
8. Eg ynski mær eina nýggja fartelefon
9. Giraffar hana langan háls
10. Vit hava keypt nýggjan bil



6




















**Les setningarnar á síðuni og skriva rætt tal við myndirnar á síðu 7!**

1. Mær dámar væl at spæla teldu

2. Eg fari ofta súkklutúr um summarið

3. Hvítabjarnir búgva í Grønlandi

4. Sitrónir eru súrar at bíta í

5. Eg eigi ein fótbólt

6. Kettan hjá okkum hevur kettlingar

7. Systir mín dugir væl at svimja

8. Tú kanst koyra við toki í Danmark

9. Vit hava tikið upp epli

10. Sjónvarpið hjá okkum er í ólagi





















## Set X við røttu myndina

1. Djórið stendur á landi
   Tað hevur langan hala
   Tað hevur ljóst skinn
   Tað hevur ein unga hjá sær

    

☐ ☐ ☐ ☐ ☐

2. Luturin er fýrkantaður
   Luturin er oftast inni
   Luturin verður brúktur at spæla við
   Ofta eru 52 í einum setti

    

☐ ☐ ☐ ☐ ☐

3. Tú skalt finna eina frukt
Hon er ikki avlong
Hon er rund
Hon er appelsingul

    

4. Tú skalt finna eitt akfar
Tað hevur motor
Pláss er fyri fleiri fólkum
Akfarið kann ikki koyra í Føroyum

    

5. Tað er ein fuglur
Fuglurin er einsamallur á myndini
Hann hevur spískt nev
Hann er svartur

    



## Set kross við rætt svar

| | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Drongurin er í strípputari blusu | | |
| Gentan eitur Rannvá | | |
| Drongurin er troyttur | | |
| Børnini eru úti | | |
| Børnini fletta bein | | |
| Børnini eru í Havn | | |
| Gentan er í gummistivlum | | |
| Gentan er 10 ár | | |
| Drongurin hevur svart hár | | |
| Ein stigi liggur aftan fyri børnini | | |



## Set kross við rætt svar

| | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Trý børn eru á myndini | | |
| Barnið til høgru er í hvítum jakka | | |
| Børnini ganga í 4. flokki | | |
| Børnini eru í Vági | | |
| Gentan til vinstru er 11 ár | | |
| Tað er ólavsøka | | |
| Skuggarnir av børnunum síggjast í hylinum | | |
| Gentan í miðjuni hevur turriklæði | | |
| Barnið til høgru eitur Lisa | | |
| Barnið til høgru er í bláum buksum | | |

**Hvat orð hoyrir ikki við her?**

**Set ring um rætta svarið og skriva tað á reglurnar**

súrepli – appilsin – banan – melón – bilur – ananas ___________________

tallerkur – posi – koppur – glas – kanna – krúss ______________________

song – stólur – borð – bók – skáp – sofa ______________________________

bilur – bussur – tok – knívur – súkkla – bátur ________________________

bilførari – lækni – skipari  – lærari – klokka – námsfrøðingur _________________

telefon - posi – taska – skúlataska – kuffert – ryggsekkur _________________

fótur – lær – armur – oyra – hálsur – gras __________________

blusa – buksur – hosur – mynd – húgva – troyggja __________________

glaður – bilsin  – gaffil – kløkk – óð – keddur _____________________

sodavatn – kaffi – dagur – saft – mjólk – te _________________________

**Finn í minsta lagi 10 orð í kassanum og set ring um tey.**

**Orðini standa tvørturum og niðureftir.**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| B | D | U | N | N | A | V |
| I | O | S | Ø | Ð | A | K |
| L | Ú | S | S | T | N | E |
| U | K | N | B | A | E | T |
| R | U | H | O | S | A | T |
| H | S | Ú | K | K | L | A |
| K | R | Á | K | A | M | T |

Skriva orðini her:

________________________________________________

________________________________________________

________________________________________________

# *Brot úr bókini “Vikarurin – tey í 5. B”.*

## *Helle Thede Johansen hevur skrivað. (BFL, 2010)*

**Børnini í 5. B eru á veg heim úr skúla. Tey koma fyrst til húsini hjá Barbaru.**

“Ná, koma tit inn við, ella hvat?” spyr Barbara og hyggur spyrjandi at Annu og Jóhannu.

Tær ætla sær óivað at spæla Sims ella at kjatta við onkran á Arto[1], hugsar Bergur við sær sjálvum. Barbara hevur bæði teldu, sjónvarp og Wii inni á kamarinum, so har dámar gentunum væl at samlast.

“Vit síggjast”, rópar Barbara og vendir sær í hurðini, meðan Jóhanna og Anna fara innum. “Minst nú til at gera skúlatingini, Bergur!” leggur hon afturat, áðrenn hon gnisandi[2] skundar sær inn og klamsar hurðina.

“Áh, hon skal altíð arga,” snerkir Bergur. “Nú spælir hon aftur stórasystir.”

“Ha, ha. Ja, gott eg ikki havi systkin,” flennir Pætur, “ella hálvsystkin. Men hon er jú hvørki. Gloym hana!”

Barbara og Bergur eru fødd sama dag, men Barbara er seks tímar eldri, og tað elskar hon at minna hann á. Mammur teirra komu at kennast á føðideildini[3], og síðan tá hava familjur teirra verið nógv saman, so tað kennist næstan, sum tey eru systkin.

“Nú? Fara vit at sparka, ella hvat?” spyr Pætur, meðan hann letst at dribla[4] og hyggur kannandi at Bergi.

Bergur orkar ikki líka væl sum Pætur, og als ikki so nógv sum hann sjálvur vil, men hann *vil* ikki vera ein, ið skal ansast eftir, tí at hann hevur havt krabbamein.

“Jú, kom og sparka,” svarar Bergur, ”men lat meg líka fara heim við taskuni og lova Ronaldo út fyrst.”

“Jepp, vinurin,” smílist Pætur. Hann veit, at Ronaldo, hundurin hjá Bergi, altíð kemur í fyrstu røð[5] hjá honum. “Eg fari eisini heim við taskuni fyrst. Tekur tú bólt við?”

---

1 kjattprogramm á internetinum.
2 flennandi.
3 deildin á sjúkrahúsinum, har børnini verða fødd.
4 letur, sum hann driblar.
5 Bergur hugsar altíð um hundin áðrenn nakað annað.

“Ja, eg taki bólt við. Síggjast um 5 minuttir.”

Familjan hjá Bergi býr í einum lítlum, svørtum húsum við flagtaki[6]. Bergur hevur ofta hoyrt fólk siga, at tað er so hugnaligt hjá teimum. Bergur hevur ikki hugsað so nógv um tað. Tað er jú bara “heima”. Honum dámar tó væl, at mamman er heima, tá ið hann kemur úr skúla. Tá hevur hon mangan kakao og bollar til hansara.

Beint nú er bara Ronaldo heima. Hann hoyrist eisini, nú hann kennist við fótafetini hjá Bergi. Hann hvínur av gleði, og tá ið Bergur letur hurðin upp, kemur ein gulbrún rakett rúkandi út millum beinini á Bergi.

“Hey, besti vinur mín. Ert tú so glaður at síggja meg?” spyr Bergur, meðan hann hýkur niður at kína hundinum, sum smoyggir sær rundan um hann.

6 grastaki.

**Set kross í rætta puntin**

| | ja | nei |
|---|---|---|
| Jóhanna og Anna fara inn við Barbaru | | |
| Arto er bók, sum 5. flokkur brúkar í skúlanum | | |
| Barbara eigur Playstation 3 í kamarinum | | |
| At gnisa merkir at flenna | | |
| Bergur fer inn við Barbaru | | |
| Barbara og Bergur eru systkin | | |
| Barbara er 6 tímar eldri enn Bergur | | |
| Mamma Barbaru og mamma Berg kennast av føðideildini | | |
| Familjurnar hjá Barbaru og Bergi eru nógv saman | | |
| Føðideildin er kantinan á sjúkrahúsinum | | |

**Set kross í rætta puntin**

| | ja | nei |
|---|---|---|
| Pætur letst at dribla | | |
| Bergur hevur havt krabbamein | | |
| Bergur og Pætur avtala at fara at sparka | | |
| Teir ætla at taka taskuna við á vøllin | | |
| Ronaldo er ein hestur | | |
| Bergur og Pætur avtala at hittast um fimm minuttir | | |
| Bergur býr í einum reyðum húsum | | |
| Húsini hjá Bergi hava flagtak | | |
| Mamman gevur ofta Bergi smákøkur og kaffi | | |
| Ronaldo er glaður, tá ið Bergur kemur heim | | |

# Krossorð

Les setningarnar og skriva svarið í kross-orðagátuna.




**Tvørturum** →

2. Fuglur, ið sigur krá krá
4. Hon er góð, tá ið kavi er

**Niðureftir** ↓

1. Seyður (kvenndýrið)
3. Djór, ið sigur mjav
5. Gott at hava, um hurðin er læst




**Tvørturum** →

1. Ikki omma, men ______________
3. Vit kóka epli í henni
5. Dreingjanavn

**Niðureftir** ↓

2. Vit brúka ein ____________ at skriva við
4. Eitt djór, sum dámar væl banan
6. Ikki fyrr, men ________________

**Tvørturum** →

2. Kópahvølpur eitur _________
5. Tá ið vit detta, fáa vit ________




**Niðureftir** ↓

1. Á húkinum, tá ið vit fiska
3. Vit gerast glað, tá ið _______ skínur
4. Ikki lítil, men ___________

**Tvørturum** →

2. Ikki eg, men ____
3. Apum dámar væl _____________
4. Klokka




**Niðureftir** ↓

1. Vit dansa um ________ á jólum
2. Tjóðfuglur Føroya

# Ger eftir forskriftini

vinstra ovast — høgra ovast

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

vinstra niðast — høgra niðast

- Set ein kross í mittasta puntin
- Set ein kross í ovasta punt í uttasta teigin til høgru
- Set ein kross næstniðast í uttasta teigin til vinstru
- Set ein kross næstovast í næstuttasta teigin til høgru
- Set ein kross niðast í næstuttasta teigin til vinstru

Prent: Føroyaprent